


# Føroyingar við til at finna olju í Barentshavi

Jan Müller

02.10.2013 - 20:20

Oljan.fo

Nógvir føroyingar forvinna sær inntøkuna í norsku oljuvinnuni. Men ikki øllum er beskorið at arbeiða hjá oljufelag, sum ger eitt oljufund fyri og annað eftir.

Nú um dagarnar kunngjørdi svenska oljufelagið Lundin, at tað hevur gjørt eitt stórt oljufund í Barentshavinum. Hetta kemur ikki so langt aftaná, at sama felag boðaði frá, at tað hevði gjørt eitt av teimum størstu oljufundunum á norska landgrunninum yvirhøvur, Johan Sverdrup.

Og eingin ivi er um, at tað man vera hugaligt at vera føroyingur í norsku oljuvinnuni, í hvussu er tá felagið ein arbeiðir fyri, eitur Lundin.

Havnarmaðurin Teitur Poulsen er ein av ovastu stjórunum hjá fyritøkuni og arbeiðir á høvuðsskrivstovuni í Geneve. Og klaksvíkingurin, Tummas Pauli Mýri starvast sum leiðari á

búskapardeildini hjá felagnum í Oslo. Báðir hava teir drúgvar royndir í altjóða oljuvinnuni. Eisini aðrir føroyingar arbeiða hjá feløgunum, sum veita tænastur til Lundin.

Seinasta fundið, sum er gjørt á Gohta leiðini 35 kilometrar í ein útnyðring úr stóru Snøhvit gasskelduni í Barentshavinum, goymir stórar nøgdir av olju og gassi.

Fyribils tøl siga, at fundið er uppá millum 113 og 239 mill. tunnur. Herfyri boraði felagið ein avmarkingarbrunn á stóru Johan Sverdrup oljukelduni í Norðsjónum, sum visti seg at vera sera væleydnaður. Tann oljukeldan verður útbygd komandi árini. Statoil er fyristøðufelag.

Stjórin í Lundin, Ashley Heppenstall sigur, at tey nú fara at bora fleiri leitibrunnar í grannalagnum, har olja og gass eru funnin í Barentshavinum.


